# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýtt blað til nýggjar tíðir

Í gjár kunngjørdu vit, at eftir páskir fer Sosialurin at koma út tríggjar ferðir um vikuna. Tað var júst um hetta mundið í mars í 1990, at Sosialurin broytti útgávudagarnar frá trimum til fimm dagar um vikuna. Tá sum nú stóðu lýsingarinntøkurnar fyri falli, og tí var neyðugt at gera eitthvørt til tess at vinna innaftur tað, sum kreppan tók av lýsingarmarknaðinum.

Nógv er broytt í miðlaheiminum hesi 20 árini – ikki minst síðani internetið sá dagsins ljós í Føroyum í 1996. Tá var Sosialurin eisini við frá fyrsta degi – og longu árið eftir í 1997 kom InternetSosialurin – so at siga í sama líki, sum vit hava kent hann síðani.

Tað er í teirri sannroynd, at vit mugu fyrihalda okkum til tær stóru broytingar, sum eru farnar fram innan miðlaheimin seinastu árini, at vit nú taka hetta stigið. Nýggju og skjótu miðlarnir fáa alt størri týdning fyri tíðindaflutningin, og tí má blaðið, sum vit kenna tað, fáa eina aðra uppgávu við at fara meira í dýpdina, meira aftur um søgur og meira analysering.

Í Miðlahúsinum hava vit tveir aðrar miðlar: Portalin hjá Føroya Tele og Rás2. Hesir eru báðir væl egnaðir til skjót tíðindi, sum prentaða blaðið ikki kann kappast við. Portalurin verður dagførdur við tíðindum alt samdøgrið, meðan Rás2 hevur fimm tíðindasendingar um dagin. Hesir báðir miðlar eru ein suksé í sjálvum sær - Portalurin sum tann so nógv mest vitjaða heimasíða í landinum. Hon er so nógv vitjað, at eingin onnur heimasíða hevur møguleikar at koma upp á knøðini á Portalinum, sum Føroya Tele eigur, men hvørs tíðindi verða skrivað av Sosialinum.

Rás2 er eisini ein sólskinssøga fyri seg. Hendan lítla útvarpsstøðin, sum einans er fíggjað við lýsingum, hevur rættiliga megnað at tikið kappingina upp almenna public service útvarpið hjá Kringvarpinum. Tað sigur ikki so lítið um, hvat ber til við dugnaligum og eldhugaðum starvsfólkum, sum hvønn dag gera sítt ítarsta til tess at náa einum góðum útsliti bæði í blað, á Portalinum og í Rás2.

Triðja páskadag kemur nýggi Sosialurin út við nútímansgjørdum sniði og broyttum innihaldi, og vóna vit, at haldarar, lesarar og lýsarar taka væl ímóti nýggja blaðnum.

**Sosialurin**

## Dýrastu dreingirnir bjóða seg fram aftur

**JOHAN DAHL**
landsstýrismaður



Trúðvirði aftan fyri yvirlýsingina frá Tjóðveldinum um vikuskiftið var burtur, áðrenn blekkið á henni tornaði.

Í yvirlýsing síni frá landsfundinum Tjóðveldisins verður brúkt slogani loysingin er bjargingin - eg má ristandi á høvdinum ásanna, at innanhøvda í hesum garpum er ongin bjarging at hóma – teir liva framhaldandi í síni fantasiverð og koma óiva at gera tað nakað fram í tíðina.

Sást tú yvirlýsingina frá Tjóðveldinum eftir teirra flokstinng um vikuskiftið? Hvat dámdi tær?

Mong hava uttan iva sitið við einum heilt løgnum fornemmilsi, tá tey kundu lesa sloganið um, at loysingin er bjargingin.

Ófatiligt sum sannleikin hvørvur skjótt í hasum umhvørvinum. Næstan skjótari enn blekkið á yvirlýsingini. Tí álvaratos: sami flokkur, sum eigur mesta heiðurin fyri, at landskassin í dag stendur brølandi tómur, vil nú sleppa framat aftur.

**Tjóðveldi kolldømt tríggjar ferðir í hálvt ár**

Tey, sum bara hava fylgt eitt lítið sindur við samfelagskjakinum, hava lagt til merkis, at bert seinasta lítla hálva árið er staðfest ikki færri enn tríggjar ferðir, at politikkurin hjá Tjóðveldinum er ein høvuðsorsøk til dagsins búskaparstøðu.

Bæði í november í fjør og aftur í hesum mánaðinum hevur Búskaparráðið positivt nevnt í frágreiðingum sínum, at niðurskurðurin í Ríkisveitingini er ein av stóru orsøkunum til, at almennu Føroyar í dag standa og mangla inntøkur.

Stóra gjógvin millum inntøkur og útreiðslur hjá landskassanum, ið er høvuðsorsøkin til trupulleikarnar í dag, varð skapt um aldarskiftið, tá Høgni Hoydal eksperimenteraði við Føroyum í sínum misskilta fullveldismodelli.

Hetta var eisini tíðarskeiðið, tá útreiðslurnar hjá landskassanum øktust út um alt mark.

***50 ár í búskaparligu oyðimørkini***

Eftir hetta hevur Tjóðveldi sjálvt í einari »óheftari frágreiðing« staðfest, at loysingin fer at kosta. Hetta er nýbrot í sjálvum sær, tí higartil hava oddafiskarnir í flokkinum havt sum sítt egna privilegium at pástaðið, at vegurin inn í Fullveldishimmiríkið var ókeypis.

Tann »óhefta frágreiðingin« fortaldi, at Føroyar skulu vera 25 ár í búskaparligu oyðimørkini eftir loysingina.

Hesi 25 ár skulu takast við fyrivarni, og tí er talan er helst um hálva øld ella meira.

Sostatt er eisini staðfest, at politiska leiðin hjá Tjóðveldinum gongur beint niður í avgrundina.

Men proklamatiónin um vikuskifti eitur: »Vit eru bjargingin«, og politiska fylgið aftan fyri Messias svarar »Halleluja«.

Er hetta myndin av einum stjórnarberandi flokki? Er hetta bjargingin? Neyvan.

**Hetta er »bjargingin«**

Um vit bert eina stutta stund hugsa okkum, at Lásagølan ongantíð hevði sæð dagsins ljós – hvat hevði so hent í Føroyum?

Her eru nøkur fá dømi:

- Fíggjareftirlitið hevði verið yvirtikið, og satsað hevði verið uppá »íslendska« leistin. Úrslitið av hesum hava vit sæð í Íslandi, har ein høvuðsorsøk til skrædlið var eitt veikt fíggjareftirlit
- Okkara bankar høvdu ikki fingið lut í bankapakkunum. Teir eru jú danskir
- Úrslitið hevði verið enn einaferð eitt totalkollaps av føroyskum bankum.
- Okkara bankar høvdu ikki fingið individuellan statsgaranti upp á meira enn 12 milliardir krónur at styrkja seg við
- Blokkurin, sum nú er góðar 600 mió. kr. árliga til vælferðartænastur hevði verið skorin burtur, uttan at onnur inntøka hevði verið funnin ístaðin. Okkara vælferðarsamfelag hevði verið burtur
- Fiskivinnupolitikkur teirra hevði ivaleyst havt lagt mesta partin av flotanum
- Flogvøllurin hevði neyvan verið útbygdur út á meir enn 1600 metrar
- Norrøna hevði verið farin av landinum, og hendan farleið fyri ferðandi og farm hevði verið burturi, tí ongin hevði í verandi fíggjarkreppu farið undir eina nýggja farleið

Soleiðis sær »bjargingin« hjá Tjóðveldinum út. Hetta er eitt sannlíkt scenario, ið er grundað á politisku útmeldingarnar frá Tjóðveldinum.

Úrslitið hevði verið minni persónligt frælsi og útsaligir møguleikar á øllum økjum fyri føroyingar.

*Tórshavn 22.03.2010*

## Munur á við afturvirkandi kraft

Í gjár skrivaði Sosialurin, at sambært Edmundi Joensen kann ein tiðnaður blokkur merkja, at 110 milliónir afturat koma í landskassan. Hetta kann veðra sannlíkt, um ríkisveitingin ongantíð varð fastfryst. Altso, um hon verður prístalsviðgjørd við afturvirkandi megi.

Hinvegin er tað eisini soleiðis, at Sigurð Poulsen, landsbankastjóri, vísir á, at við eini inflatión á tvey prosent um árið, kann geva umleið 12 milliónir krónur afturat í kassan, um ríkisveitingin frá komandi ári verður prístalsviðgjørd.

**-eij**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.